Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 25**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um møgulig gjøld á bingjuplássinum.
Málið varð á bygdarráðsfundinum 27. apríl 2011 beint aftur í nevnd.

Nevndin mælir til at áseta hesi gjøld:
300,- kr/m$^3$ fyri vanligt burturkast fyri nøgdir størri enn 1 m$^3$. Undantikið eru hvítvørur og innbúgv.
300,- kr/m$^3$ fyri stórvið og plattar, tó altíð í minsta lagi 300,- kr.

e.s. viðvíkjandi glasull og gipsplátum verður sett í faldaran, at smærri nøgdir kunnu koyrast í bingjuna til burturkast av brenna, ímeðan størri nøgdir verða at samla í stórsekkir (sambært IRF). -/JD.
J. nr. 2009-315

**Viðv. 25.**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 26**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um mál um at ognast neyðugt lendi burturav matr. nr. 167a hjá Hannu Kampmann til breiðking av Niðara Vegi.

Nevndin mælir til at heita á eigaran um at selja neyðugt lendi til vegbreiðking.
Vestmanna Kommuna hevur áður í skrivi, dagf. 21. juli 2008, bjóða Hannu 250 kr. fyri fermeturin fyri uml. 75 m$^2$ burturav ogn hennara.

**Viðv. 26.**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 27**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um fyrispurning frá Fríðálvi Bláhamar um møguleikan fyri at byggja neyst á ognir hansara matr. nr. 260u, 260q og 352 (uttanfyri Seglhúsið) 2 metrar longur niðan enn neystini uttanfyri.
J. nr. 2009-373

Nevndin mælir til at geva loyvi til at byggja neystið 2 metrar longur oman, heldur enn longur niðan, og at marknaumskipan verður gjørd í hesum sambandi soleiðis, at Fríðálvur letur lendið omanfyri ætlaða neystið til kommununa, og at kommunan afturfyri letur neyðugt lendi burturav matr. nr. 354a til neystið.

**Viðv. 27.**
Tilmæli einmælt samtykt við ískoyti um, at søkjast skal um endaligt byggiloyvi við neyðugum tekningum og upplýsingum.

# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð
## Bygdarráðsfundur tann 24. mai 2011, kl. $19^{00}$.

**Mál 28**
Uppskot til ársroknskap fyri Vestmanna Kommunu fyri 2010.

**Viðv. 28.**
Ársroknskapurin einmælt samtyktur og undirskrivaður.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 20.00.

Sign.:

Karl A. Olsen Herit Magnussen Pauli T. Petersen Jón Mikkelsen

Evelyn Gaard Siri S. Niclassen Bárður Poulsen